TVØROYRAR KOMMUNA

## BARNAGARÐURIN MÝRIFIPAN

# Leiðari til Barnagarðin Mýrifipan

Barnagarðurin Mýrifipan søkir eftir leiðara 40 t./v. at byrja 1. august. Okkara dugnaligi leiðari hevur sagt seg úr starvi vegna víðari útbúgving, tí sóknast vit eftir einum nýggjum leiðara.

Í barnagarðinum eru 67 børn býtt í 2 stovur og 1 vøggustovu. Harumframt eru 20 børn í úti-barnagarði. Í barnagarðinum er eisini eitt stuðulstoymi, sum tekur sær av børnum við serligum tørvi.

Á dagstovnaøkinum í Tvøroyrar kommunu eru broytingar á veg, við tað at ein vil byggja eina integreraða institutión, har bæði dagrøktin (spælistovan) og barnagarðurin eru saman, kortini við hvør sínum leiðara. Somuleiðis er ætlanin at fáa avtalustýring í kommununi við barnagarðinum sum eitt pilotprojekt. Tann, ið verður settur, má tí vera nýhugsandi og megna at møta fjølbroyttum avbjóðingum.

**Vit bjóða**

- Eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi har náttúran hevur stóran týdning og leiklut í gerandisdegnum og har spælið fyllir nógv.
- Dugnalig starvsfólk.
- Eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum.
- Møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar.
- Møguleika fyri eftirútbúgving innan leiðslu o.a.

**Vit vænta at tú**

- Ert útbúvin námsfrøðingur, helst við leiðsluroyndum.
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir.
- Hevur hugsjónir um virksemi á einum stovni, ið rúmar bæði vøggustovu, barnagarð og útibarnagarð.
- Hevur hug og áræði at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag í einum avbjóðandi fakumhvørvi, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum umframt foreldrum og starvsfelgum.
- Hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi.
- Sært møguleikar framum vansar.
- Hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir.
- Kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur.
- Dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanveggja.
- Hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

**Setanaviðurskifti**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

**Meiri fæst at vita**
Um starvið við at venda sær til Susanne Madsen, leiðara á sosialu deild, á tlf. 371085 kl. 10.00 – 16.00

**Umsókn**
Saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving, skal sendast til:

**Tvøroyrar Kommuna, sosiala deild**
Tvørávegur 27 · FO- 800 Tvøroyri
viðm. »Leiðari til Barnagarðin«

Freistin at søkja er mánadagin 14. mai.

# VARALEIÐARI til MRCC Tórshavn





**Tilbúgvingarstovnur Føroya søkir eftir varaleiðara til virkisøkið MRCC Tórshavn.**

**Starvið**
Varaleiðarin hevur ábyrgdina av tekniska útbúnaðinum á stovninum. Varaleiðarin og leiðarin á stovninum skulu vera tøkir í neyðstøðu, og teir skiftast at hava bakvakt. Varaleiðarin skal vera við til at skipa bjargingararbeiði saman við teimum, ið ganga á vakt.

**Høvuðsuppágávurnar fevna m.a. um**

- viðlíkahald og rakstur av tekniska útbúnaðinum
- at røkja góðskuskipanina ISO-9001
- at vera við til at skipa fyri venjingum, eftirmetingum, og førleikamenning av starvsfólki
- vanligar umsitingarligar uppgávur

**Almenn førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava hægri tekniska útbúgving, t.d. elektroniktøkningur, víðkað maskinmeistaraprógv ella líknandi. Leiðsluuroyndir, royndir innan samskiftistøkni og kunnleiki um sjóferðslu eru at rokna sum fyrimunir fyri at kunna røkja starvið.

Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, evni at fyriskipa og duga at arbeiða sjálvstøðugt. Góð evni at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum eru ein treyt. Hollur teldufrøleiki er ein treyt fyri at kunna røkja starvið.

Tann, ið settur verður, skal vera til reiðar at eftirútbúgva seg, eitt nú innan leiðslu av bjargingararbeiði á sjónum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 32. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið. Lønin er 29.273,94 kr um mánaðin, við viðbót.

Starvsheitið er varaleiðari, og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til leiðaran á MRCC Tórshavn. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí umframt hini aðalráðini. Tænastustaðurin er Tilbúgvingarstovnur Føroya, MRCC Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til

MRCC Tórshavn, Tinghúsvegur 64, Postboks 1120, 110 Tórshavn ella til t-post: manager@mrcc.fo

Umsóknir skulu vera MRCC Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 22. mai. Fleiri upplýsingar um starvið fáast hjá Jóhan J. Jakobsen, virkandi leiðara fyri MRCC Tórshavn á tel. 351302.

Sí annars heimasíðuna www.mrcc.fo

# SKRIVSTOVUSTARV

Hjá politinum í Havn er eitt fast skrivstovustarv leyst at søkja.

Starvið skal setast skjótast gjørligt.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna og verður fyribils skipað soleiðis:

Mánadag til og við hósdag frá kl. 10.00 til kl. 16.00 og fríggjadag frá kl. 09.00 til kl. 15.00.

Starvsøkið fevnir um alt skrivstovuarbeiði hjá politinum, har høvuðsuppgávan fyribils verður at passa telefonumstillingina hjá politinum í Havn – tlf. nr. 351448.

Umsøkjari skal hava skrivstovuútbúgving ella royndir í skrivstovuyrkinum.

Starvssetanin er eftir sáttmálanum millum HK/STAT og danska fíggjarmálaráðið.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Halldis Poulsen, skrivstovuleiðara á tlf. 351448.

Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda landfútanum, Smyrilsvegur 20, postboks 3018, 110 Tórshavn.

Tann, sum settur verður, hevur møguleika at fáa økt arbeiðstíðina við 5 tímum um vikuna í tíðarskeiðinum 1. mai til 31. oktober 2007.

**FØROYA LANDFÚTI**
Tórshavn, tann 27. apríl 2007

Karen Marie Olesen


# TOYOTA reservedele

Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.

**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**

DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk

Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug

ISO 9001 certificeret

DAG Dansk Autogenbrug - vi skåner miljø og økonomi

Autoophuggernes DATALAGER DK


Lesið Sosialin - so eru tit við